## Audi framgongd



Yvirskotið hjá Audi bilverksmiðjuni varð í fjør 8,9 milliardir krónur, og umsetningurin vaks við 10,4 prosentum. Ein av orsøkunum til góða úrslitið er nýggi Audi A4, ið bleiv sera væl móttikin.

*Kelda: Motor Magasinet*

## Goodyear og Siemens



Amerikanska Goodyear dekkfyritøkan og Siemens í Týsklandi, hava gjørt samstarvsavtalu um eina elektroniska ávaringarskipan, sum sigur frá um nakað er áfatt við einum av dekkunum. Skipanin, ið verður originalmonterað í nýggjar bilar, verður klár at taka í nýtslu í 2005.

## Hyundai Getz



Ein nýggjur koreanari, Hyundai Getz, verður sýndur fram á bilaframsýningini í Geneve í hesum døgum. Bilurin skal kappast við bilar sum VW Polo, Fiat Punto og Skoda Fabia. Hyundai Getz kemur á marknaðin seinni í ár.

*Kelda: Motor Magasinet*

ÚT AT KOYRA

# Fleiri hava ætlanir um Smart líknandi bilar

**Tá Mercedes yvirtók MCC Smart í 1998, var ikki stórvegis áhugi fyri bilinum millum fólk. Men eftir at Smart við tíðini er vorðin ein væl umtóktur býbilur, sær út til at vent er í holuni. Nú eru tað fleiri bilverksmiðjur ið hava ætlanir um at gera Smart líknandi bilar**

BILAR

*Magnus Gunnarsson*



*MCC Smart. Hóast eina sera trupla byrjan, sær tað út til at Smart er vorðin ein fyrimynd hjá fleiri bilverksmiðjum*



*Um hesin Saab 9-1 verður veruleiki, verður tað minsti Saab nakrantíð*

Eftir nøkur sera turbolent ár hjá DaimlerChrysler, hevur Smart tó hórða undan. Nú sær tað út til at fleiri bilverksmiðjur hava ætlanir um at gera Smart líknandi bilar.

Smart er einans 2,50 m langur, og er sera lættur at seta frá sær í býum við nógvari ferðslu og trongum parkeringsviðurskiftum.



*Umframt at BMW hava Mini á skránni, kemur møguliga eisini hesin BMW í eini mini-Mini útgávu*



*Opel útgávan kemur at síggja nakað soleiðis út sum hesin Opel Tanga*

### Sama plattform

Hjá General Motors arbeiða designararnir við tekningum av smáum bilum til bilmerkini Opel, Saab, Subaru, Suzuki, Chevrolet og møguliga eisini Fiat. Hetta eru verksmiðjur sum GM eigur, ella sum teir samstarva við. Ætlanin er at allir hesir bilar skulu hava sama plattform. Eisini hjá BMW, sum hava Mini Cooper koyrandi, hava teir ætlanir um ein mini-Mini.

*Kelda: FDM / Motor*

# Tíðindaskrivið Ellisakfør aftur á Shellstøðunum

**Føroya Shell og Føroya Ellisakfør hava gjørt eina nýggja avtalu fyri 2002, soleiðis at limablaðið, Tíðindaskrivið Ellisakfør, nú aftur verður selt á Shellstøðunum kring landið**

ELLISAKFØR

*Magnus Gunnarsson*

Í blaðnum hesaferð er nógv áhugavert tilfar. Sum til dømis um eina ferð úr Skúgvi um Sandoynna til Havnar í 40 árunum. Eisini er brot úr sera áhugaverdum tilfari sum Einar Petersen, rithøvundur, hevur skrivað um bilasøguna í Vágum. Sum vanligt eru eisini nógvar áhugaverdar gamlar myndir í blaðnum, og ymiskt annað frá felagnum.



*Fyrsti bilurin, ið kom í Vágar, kom í 1923, og var tað ein Ford T. Hesin bilurin kom sum frá leið at verða róptur "Lazarus". Her koyrir "Lazarus" fyri snikkaravirkið við Gjónna*



# Frælsistónar í Skopun

**Unga Tjóðveldið skipar fyri einari Free Føroyar konsert á Sandoynni um vikuskiftið. Seks bólkar verða við til at breiða frælsisboðskapin**

KONSERT

*Heri á Rógvi*



*Unga Tjóðveldið fer aftur um vikuskiftið at skipa fyri einari Free Føroyar konsert. Hesaferð verða tað sandoyingar, ið fáa møguleikan at hoyra, hvat ein tílík inniber.*

Free Føroyar tokið koyrir aftur. Hesaferð verður steðgað á á Sandoynni. Fríggjakvøldið verður Samljóð í Skopun vertur fyri einari Free Føroyar konsert. Free Føroyar eru konsertir, ið Unga Tjóðveldið hevur skipað fyri nakrar ferðir nú. Roynt hevur verið við sovorðnum konsertum bæði innandura og uttandura, og áhugin hevur sum heild verið stórur. Nú verður farið "on the road" við frælsistónunum, og Sandoyggin stendur fyri tørni. Tað er heldur ikki av tilvild, at Unga Tjóðveldið hevur valt sær júst Sandoynna. Tjóðveldisflokkurin skal um sama mundið hava floksting í oynni, so tað liggur ræðið fyri at halda konsert. Men tað krevur nógva fyrireiking, orku og vælvilja at fyriskipa eitt tílíkt tiltak, ljóðar tað frá fyriskiparanum.

Bólkarnir, ið trína á pallin fríggjakvøldið, eru: Side Effect, Marigold, Tónar, Iris, Grønt Fótslím og Human Caos. Teir flestu av hesum bólkum eru kendir bólkar í Føroyum. M.a. hava fleiri teirri roynt seg í Prix Føroyum.

–Free Føroyar er ein sýnisgluggi fyri føroyskan tónleik, ið virkar eftir tí grundhugsan, at føroyingar eru serstøk tjóð í heiminum, og at hetta eisini er galdandi innan tónleikaheimin, sigur Unga Tjóðveldið í tíðindaskrivi. Tey siga tiltakið varpa ljós á føroyskan tónleik og Føroyar.

Free Føroyar konsertin er ókeypis fyri øllum, eisini teimum, ið ikki taka undir við Tjóðveldisflokkinum. Møguleiki verður á konsertini at keypa sær "Free Føroyar" troyggur, fløgur og ymiskt annað spennandi, siga fyrireikararnir.

Unga Tjóðveldið vónar at síggja so nógv fólk sum gjørligt til tiltakið fríggjakvøldið í Skopun.

# Stríð um navnalógina

**Ætlaðu broytingarnar í navnalógina hava elvt til stríð í rættarnevndini, og ein partur av nevndini hevur eisini lagt fram egið uppskot. Høgni Hoydal heldur hesa mannagongd vera óhóskandi**

POLITIKKUR

*Heri á Rógvi*



*Hvussu skal barnið eita? Tað eru ósemjur millum landsins kosnu, hvørji nøvn foreldur skulu sleppa at geva sínum børnum.*

Tað byrjaði alt við, at Høgni Hoydal, landsstýrismaður, legði eitt uppskot um broytingar í navnalógini (løgtingslóg um fólkanøvn) fyri tingið. Hann segði tá, at talan var um liberalisering av navnalógini, og hetta vóru broytingar, sum koma øllum við. Hetta var hin 16. oktober 2001. Undir fyrstu viðgerðini av hesum málinum, 6. november 2001, vóru langt frá allir flokkar samdir við landsstýrismanninum í hansara sjónarmiðum. Hvør í sínum lagi vísti løgtingsmenn á broytingar, ið teir ynsku framdar, ið ikki vóru í uppskotinum. Broytingarnar vóru nógv merktar av persónligum viðurskiftum hjá tingmonnum, og tað vórðu heldur ikki fá dømi havd á lofti, har navnalógini gott kundi taka við.

Áðrenn málið kom fyri Løgtingið, hevði málið verið til hoyringar ymsastaðni, og tað er longri lesnaður at koma ígjøgnum allar hesar viðmerkingar. Tann reyði tráðurin í viðmerkingunum, serliga frá prestum, var, at viðmerkjararnir vóru glaðir fyri broytingarnar, ið vórðu fingnar í lag, tá navnalógini varð sett í gildi fyri skjótt 10 árum síðani í 1992. Navnanevndin vísti á, at gongdin gekk tann rætta vegin, og fólk vóru farin at venja seg við reglarnar, tá tey skuldu doypa teirra børn.

Upprunaliga uppskotið hjá Høgna Hoydal mældi til, at onnur atlit enn bert málslig atlit skuldu verða tikin, eitt nú skuldu ættleid fáa betri viðurskifti, men formurin skuldi framvegis vera tann sami, at navnanevndin skuldi hava avgerandi orðið at siga, og føroyskar málreglur skuldu haldast framum alt annað. Høgni Hoydal kallaði hetta sum sagt fyri eina liberalisering av lógini.

Eftit tað umtalaðu fyrstu viðgerðina endaði málið so hjá rættarnevndina, har Helena Dam á Neystabø er formaður. Í fleiri fundum hevur lógin um fólkanøvn verið uppi og vent í rættarnevndin, og tað var eisini ein semja við landsstýrismannin at byrja við.

–Rættarnevndin er samd við landsstýrið, at tað er óheppið, at kjak og ónøgd hevur staðist av navnalógini, nú tað loksins eydnaðist okkum at yvirtaka hetta málsøkið. At navnalógin er føroysk slóðar fyri bæði málsligum og mentanarligum framburði. Longu nú eru tvey álit greidd úr hondum um spurningin, sum eru gott grundarlag undir tí orðaskifti, sum óivað kemur at verða í eina tíð afturat, stendur at lesa á løgtingsheimasíðuni(logting.fo).

Ein partur av rættarnevndina vildu tó ikki taka undir við, at tað var so mikið torført at gera undantøk. Serliga varð hugsað um nøvn, ið høvdu verið í ættini yvir eitt longri tíðarskeið. Rúna Sivertsen, Alfred Olsen og Hans Pauli Strøm løgdu síðani sítt egna uppskot fyri Løgtingið, ið samsvaraði við teirri ætlanir. Tey søgdu seg vera bangin fyri, at landsstýrismaðurin fór at taka uppskotið aftur.

–Uppskotsetarnir halda, at tað er ódemokratiskt, um landsstýrismaðurin, umboðandi ein minniluta í tinginum, skal hava møguleika fyri at hindra, at uppskotið verður framt í hesi tingsetuni við at taka tað aftur, varð sagt í viðmerkingunum.

### Nevndin samdist

–Vit gjørdus samd um, at málreglurnar skulu haldast, men ynskja fólk at fáa uppkallað síni børn, so kann navnanevndin geva undantaksloyvi, sigur Helena Dam á Neystabø, formaður í rættarnevndini, tá vit spyrja hana eftir, hvørja endaliga niðurstøðu nevndin ella rættari sagt ein meiriluti í nevndini, Helena Dam á Neystabø, Hans Pauli Strøm, Alfred Olsen, Rúna Sivertsen og Eyðun Viderø.

Meirilutin hevur gjørt nakrar smærri broytingar. M.a. verður nú møguligt at hava fleiri enn tvey eftirnøvn.

Alfred Olsen, ein av uppskotstillarunum av nýggja uppskotinum, sigur, at tey væntandi fara at taka uppskotið aftur, nú hevur lagt hetta fram, og hetta væntandi verður samtykt.

–Rættarnevndin hevur harafturat samtykt, at farast skal undir kunnandi arbeiði um navnalógina, soleiðis at fólk fáa betri møguleikar at seta seg inn í viðurskiftini, sigur Helena Dam á Neystabø

### Óhóskandi

Høgni Hoydal heldur tað vera løgið, at ein partur av rættarnevndini leggur fram sjálvstøðugt uppskot um eitt mál, ið nevndin vigerð.

–Um hetta verður vanligt framyvir, so fer at hetta at broyta arbeiðið við lógaruppskotum munandi, og eg haldi hendan framferðarháttin vera óhóskandi, sigur Høgni Hoydal.

Tá uppskotið hjá teimum trimum, Rúnu, Alfred og Hans Paula, var til fyrstu viðgerð 8. mars vísti Signar á Brúnni úr Tjóðveldisflokkin, sum eisini er limur í rættarnevndini, at framferðarhátturin í sambandi við uppskotið hjá teimum trimum ikki var í tráð við tingskipanina.

Tað vóru ikki nógvir tingmenn, ið tóku orðið í tí orðaskiftinum, og tað gjørdist klárt, at málið nokk skuldi avgerast í rættarnevndini.